## Danskir fiskimenn í øðini um fylgissveinaeftirlit

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Føroyingar við Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharra á odda fyrireiða nú fylgisveinaeftirlit á føroyskum fiskiskipum, eisini undir Føroyum. Skipanin er longu galdandi fyri føroysk skip á fjarleiðum. Og meðan hetta hendir, so eru tey fyrstu málini, har fylgissveinaeftirlit hevur avdúka óregluliga veiðu í donskum sjóøki eru á veg til dómstólarnar.

Tað fyrsta málið er sent víðari til ákærumyndugleikan í einum løgregludømi í Vesturjútlandi, har støða skal takast til um ein skipari skal fáa sektaruppskot, ella um málið skal fyri rættin. Danski staturin vil krevja millum eina hálva og eina millión krónur í endurgjaldi og hald skal leggjast á veiðu.

Danska Fiskarídirektoratið væntar sær nógv av nýggju skipanini við fylgisveinamyndum, sum kann avdúka hvar eitt fiskiskip er og um tað flytir seg sama veg sum fiskurin. Tað ber tó ikki til at siggja um skipið hevur reiðskapin úti.

Formaðurin fyri fiskimannafelagnum í Esbjerg, Hans Aa sigur við Jydske Vestkysten, at hann heldur tað er heilt órímuligt at nýta fylgisveinaeftirlit móti fiskimonnum. Skulu fiskimenn dømast fyri ólógiga veiðu, so skulu teir takast á staðnum.

Vinstra heldur at rættatrygdin hjá fiskimonnum er hótt av fylgisveinaeftirliti.

Tað er ES, sum hevur trýst fylgisveinaeftirlit í gjøgnum í Danmark.

## Greenpeace í herna móti gen-laksi

Ottawa (NTB-Reuters-DPA) Týsdagin framdi týsdagin tiltøk móti einum alibrúku á Prince Edwards Island í landsynningspartinum av Kanada. Felagsskapurin mótmælir, at hetta alibrúk alir gen-viðgjørdan laks. Greenpeace heldur, at hesin alilaksur er ein hóttan móti villa laksinum.

Genviðgjørdi laksurin veksur fýra til seks ferðir skjótari enn villur laksur. Greenpeace heldur, at enn er ikki nóg væl lýst fylgjurnar av at broytt er í arvaeginleikunum hjá hesum laksi.

## Skiparin tók við bót

Skiparin á trolaranum úr Kirkwaal í Orkneyoyggjunum, sum varð tikin áv danska sjóverjuskipinum “Triton” í gjar við einum sektaruppskotið upp á 60.000 krónur. Samstundis var hald lagt á tann ólógliga posan og eina netsondu.

Trolarin fer nú aftur undir Føroyar at royna. Hann kom í føroyskan sjógv sunnukvøldið og longu týsdagin hevði hann 50.000 pund inni.

# Ongin verður tikin av fylgisveini



*Brimil kann verða hjálptur av fylgisveini, skal hann avdúka ólógligan fiskiskap, men hann má taka skipini upp á feskan gerning, skal tað halda í rættinum. Ella kann tyrlan hjálpa honum*

**– Fylgisveinaeftirlitið er fyrst og fremst fyri trygdina á sjónum. Einki skip verður tikið, bara tí at fylgisveinurin vísir nakað illgrunasamt. Verður eitt skip tikið fyri ólógliga veiðu undir Føroyum, so skal tað takast upp á feskan gerning av skipi ella tyrlu, sigur Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri**

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Oddagreinin í Sosialinum í gjár viðgjørdi møguleikarnar við nýggju eftirlitsskipanini við fylgisveini, har møguligt at fylgja við hvar skip eru stødd. Danir fyrireika nú fyrsta rættarmálið, har skip, sum er avdúkað í ólógligum fiskiskapi, er avdúkað gjøgnum fylgisveinaeftirlit. Hetta er ein skipan, sum ES hevur fingið í gjøgnum í Norðsjónum og sum føroyskir fiskimenn á fjarleiðum kenna væl til, eitt nú á Flemmish Cap og í Barentshavinum.

– Hjá landsstýrinum er aðalmálið við at seta hesa skipan í verk undir Føroyum trygdin hjá fiskimanninum. Sum nummar tvey vilja vit við hesi skipan vísa aftur skuldsetingunum, sum fiskimenn javnan fáa niður yvir seg, at teir fiska ólógliga og sum nummar trý vilja vit nýta hesa skipan sum eftirlit, sigur Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum.

– Onki skip verður tikið, bara tí at fylgisveinurin kemur við einum begrundaðum illgruna um at skipið veiðir ólógliga. Síggja vit, at eitt skip eitt nú flytir seg við tóvferð, einar fýra míl um tíman, á eini stongdari leið, so kann vaktarskip ella tyrla fara at kanna skipið. Men skipið verður ikki tikið, bara fylgisveinurin sýnir at skipið er á ólógligari leið. Fylgisveinurin kann bara vísa okkum positiónina hjá skipinum, hvussu skjótt tað siglir og hvønn veg tað siglir,sigur Jørgen Niclasen.

– Tað er heldur ikki fyrr enn fyri kortum, at ein tyrla kann avdúka at eitt skip veiðir ólógliga og at hendan avdúking endar í rættinum. Fyrr kundi tyrlan bara, eins og fylgisveinurin í dag, vísa á at okkur kundi verða galið, sum vaktarskipið síðan skuldi kanna. Í dag eru tyrlurnar útgjørdar við GPS og myndatóli. Skal eitt skip fellast av tyrlu, so er neyðugt við eini mynd, sum sýnir skip og positiónina hjá GPS. Also, talan skal vera um eitt veruligt prógv, sigur Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri.

# Stórur trolari á Fuglafirði

UPPISJÓGVAFISKUR

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Hósdagin lá ein stórur trolari á Fuglafirði og landaði markel. Trolarin er komin við dýru lastini til Føroya og hendan skal ikki í kvørnina hjá Havsbrún. Makrelurin er frystur og skal goymast í frystitunnlunum, sum er sprongdir inn í basaltið á havnalagnum í Fuglafirði. Seinni er so ætlanin at skip skal koma eftir makrelinum, áðrenn hann endar sína tigandi tilveru, sum niðursjóðaður markelur í dósum á evropeiska marknaðinum.

Trolarin “Veronica” er yvir 100 metur langur og tað er sama reiðarí, sum eigur heimsins størsta trolara, ið eigur hendan. At makrelbátar úr Írlandi og Orkney oyggjunum koma til Føroya at goyma fisk hevur verið siður seinstu 10 árini. Tað byrjaði við, at gamli “Heygadrangur”, orkneyartrolarin “Orcades Viking” fór at leggja veiðuna upp í Føroyum og síðan er hetta hildið fram.

Nú er stóra frystihotellið í Kollafirði um at vera liðugt og tá koma uttan iva fleiri útlendskir uppisjógvabátar hendanvegin at leggja veiðuna upp.



*Stóri trolarin “Veronica” á Fuglafirði hósmorgunin*

*Mynd: Interseafood.fo*



FISKIVINNUTÍÐINDI

# Gólvuppboðssølan

| Sýslu-nummar | Skipanavn | Reiðskapur | Kilo |
|---|---|---|---|
| 0 | Ikki Skrásett Før | snella | 270 |
| FD 18 | Sirið | snella | 256 |
| FD 79 | Havørnin | snella | 264 |
| FD 102 | Bylgjan | snella | 466 |
| FD 112 | Barmur | snella | 501 |
| FD 123 | Riddarin | snella | 144 |
| FD 131 | Høghamar | snella | 586 |
| FD 136 | Lilja | snella | 1.157 |
| FD 138 | Byrgi | snella | 1.224 |
| FD 15 | Anna Maria | snella | 578 |
| FD 174 | Silver Belle | snella | 659 |
| FD 193 | Marna | snella | 2.007 |
| FD 205 | Greta | snella | 506 |
| FD 219 | Sjósøki | snella | 310 |
| FD 229 | Camilla | snella | 231 |
| FD 237 | Eyð | snella | 445 |
| FD 263 | Rúni | snella | 587 |
| FD 268 | Selnes | snella | 832 |
| FD 316 | Annfríð | snella | 378 |
| FD 324 | Vátanes | snella | 458 |
| FD 329 | Karin 3 | snella | 851 |
| FD 340 | Løkur | snella | 853 |
| FD 348 | Skoratindur | snella | 1.649 |
| FD 355 | Fríða | snella | 572 |
| FD 363 | Knúkur | snella | 233 |
| FD 367 | Báran | snella | 314 |
| FD 377 | Julia | snella | 2.118 |
| FD 380 | Amanda | snella | 721 |
| FD 386 | Slættiklettur | snella | 592 |
| FD 398 | Havrenningur | snella | 630 |
| FD 406 | Alma-J | snella | 674 |
| FD 420 | Reynir | snella | 1.063 |
| FD 421 | Hjallur | snella | 474 |
| FD 424 | Morning Star | snella | 74 |
| FD 437 | Munkurin 3 | snella | 992 |
| FD 460 | Safir | snella | 2.958 |
| FD 482 | Gamli Sigmund | snella | 313 |
| FD 508 | Halgafelli | snella | 440 |
| FD 512 | Nabbi | snella | 1.027 |
| FD 557 | Fiskivarði | lína | 126 |
| FD 566 | Láin | snella | 238 |
| FD 589 | Fimm Systrar | snella | 859 |
| FD 612 | Knørrur | snella | 443 |
| FD 65 | Eik Helgadóttir | snella | 1.972 |
| FD 660 | Falkurin | snella | 558 |
| FD 677 | Juni | snella | 283 |
| FD 720 | Grunningur | lína | 765 |
| FD 733 | Rivtangi | snella | 109 |
| FD 750 | Brimnes | snella | 925 |
| FD 761 | Gunnvá | snella | 1.023 |
| FD 77 | Irdi | snella | 520 |
| FD 771 | Katrin | snella | 590 |
| FD 775 | Langanes | snella | 833 |
| FD 780 | Bakkafossur | snella | 304 |
| FD 784 | Vónin | snella | 381 |
| FD 80 | Norðbúgvin | snella | 341 |
| FD 808 | Alma | snella | 1.069 |
| FD 84 | Jón | snella | 191 |
| FD 855 | Lómur M/B | snella | 460 |
| FD 865 | Báran | snella | 406 |
| FD 89 | Høvdin | snella | 421 |
| FD 9 | Jógvan Norði | lína | 1.499 |
| FD 930 | Borgarfelli | snella | 739 |
| FD 968 | Sjóstjørnan | snella | 567 |
| FD1046 | Miðhamar | snella | 586 |
| FD1094 | Herbjørg | snella | 269 |
| FD1096 | Ringlasteinur | snella | 189 |
| FD1098 | Bylgjan | snella | 462 |
| FD1108 | Luna | snella | 962 |
| FD1110 | Arctic | snella | 1.103 |
| FD1116 | Frida | snella | 381 |
| FD1130 | Sjóbúgvin | snella | 602 |
| FD1140 | Eyðin | snella | 1.034 |
| FD1144 | Neshamar | snella | 599 |
| KG 22 | Hilda | snella | 803 |
| KG 106 | Barið | snella | 575 |
| KG 112 | Bláaberg | snella | 571 |
| KG 170 | Eljan | snella | 333 |
| KG 171 | Núpisklettur | snella | 576 |
| KG 172 | Syðratangi | snella | 816 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| KG 176 | Svartbakur M/B | snella | 952 |
| KG 21 | Kyrrasund | snella | 922 |
| KG 248 | Sjósteinur | snella | 148 |
| KG 279 | Norðberg | lína | 4.136 |
| KG 296 | Glæman | snella | 330 |
| KG 391 | Eysturhøvdið | snella | 630 |
| KG 423 | Jaspissteinur | snella | 510 |
| KG 444 | Heiðabrúgv | snella | 696 |
| KG 476 | Pison | lína | 235 |
| KG 499 | Ennið | snella | 268 |
| KG 543 | Halgafelli | snella | 656 |
| KG 575 | Birgit C. | snella | 572 |
| KG 603 | Sjófrúgvin | snella | 487 |
| KG 608 | Herdis | snella | 320 |
| KG 640 | Hansa | snella | 382 |
| KG 703 | Henny | snella | 639 |
| KG 706 | Skýlisklettur | snella | 869 |
| KG 743 | Elsa | snella | 990 |
| KG 744 | Osla | lína | 3.564 |
| KG 888 | Rannvá | snella | 440 |
| SA 106 | Svananes | snella | 331 |
| SA 110 | Netjan | snella | 288 |
| SA 26 | Bárðarenni | snella | 722 |
| SA 350 | Hvessingur | snella | 1.187 |
| TG 122 | Fríðhild | snella | 825 |
| TG 185 | Egil | snella | 522 |
| TG 227 | Edvør | snella | 2.551 |
| TG 283 | Herdis | snella | 627 |
| TG 303 | Richard Í Smiðjuni | snella | 657 |
| TG 397 | Kvikk | snella | 267 |
| TG 401 | Barbara | | |
| snella | 478 | | |
| TG 435 | Jórun | | |
| snella | 286 | | |
| TG 460 | Mariann | | |
| snella | 668 | | |
| TG 471 | Núpur | | |
| snella | 608 | | |
| TG 495 | Egil M | | |
| snella | 278 | | |
| TG 56 | Marian M. | | |
| snella | 688 | | |
| TG 562 | Todnes | | |
| snella | 330 | | |
| TG 576 | Svanur | | |
| snella | 1.095 | | |
| TG 60 | Sjófarið | | |
| snella | 633 | | |
| TG 620 | Bergur Ii | | |
| snella | 487 | | |
| TG 622 | Varðin | | |
| snella | 1.805 | | |
| TG 631 | Skarstein | | |
| snella | 657 | | |
| TG 632 | Vørðan | | |
| snella | 440 | | |
| TG 650 | Nípan | | |
| snella | 362 | | |
| TG 91 | Stjørnan | | |
| snella | 637 | | |
| TN 23 | Espingur | | |
| snella | 969 | | |
| TN 270 | Torgun | | |
| snella | 459 | | |
| TN 288 | Inga Mareta | | |
| snella | 374 | | |
| TN 325 | Rádni | | |
| snella | 705 | | |
| TN 390 | Trý Systkin | | |
| snella | 529 | | |
| TN 417 | Gunbjartur | | |
| snella | 457 | | |
| TN 422 | Nón | | |
| snella | 1.086 | | |
| TN 483 | Ægir | | |
| lína | 3.858 | | |
| TN 485 | Snævalheyggur | | |
| lína | 157 | | |
| TN 647 | Sílið | | |
| snella | 120 | | |
| TN 712 | Teistaklettur | | |
| snella | 272 | | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| TN 718 | Hvítaberg | snella | 149 |
| TN 752 | Tvey Systkin | snella | 378 |
| TN 81 | Thommas | snella | 781 |
| TN 832 | Hvítanes | snella | 127 |
| TN 892 | Nøvan | snella | 607 |
| TN 897 | Maj-N | snella | 465 |
| TN 989 | Hvítiklettur | snella | 133 |
| TN1053 | Kjógvin | snella | 215 |
| TN1071 | Guðrið | snella | 370 |
| TN1099 | Lena | snella | 484 |
| VA 143 | Thurid | snella | 286 |
| VN 125 | Ægir | snella | 205 |
| VN 136 | Sævar | snella | 358 |
| VN 152 | Sjóarfossur | snella | 355 |
| VN 204 | Svanurin | snella | 323 |
| VN 25 | Toftafossur | snella | 151 |
| VN 378 | Turið | snella | 150 |
| VN 397 | Veðranes | snella | 520 |
| VN 408 | Jónvør | snella | 732 |
| VN 425 | Halla | snella | 169 |
| VN 430 | Ruðitangi | snella | 412 |
| VN 447 | Fríðgerð | snella | 444 |
| VN 61 | Sjóarklettur | snella | 146 |

